# Landmálingsteknikari til Umhvørvisstovuna

**Søkt verður eftir einum landmálingsteknikara til matrikuldeildina á Umhvørvisstovuni. Starvið fevnir um matrikulera málsviðgerð, uppmáting, ráðgeving og lendisfyrisiting annars.**

## Vit bjóða

Umhvørvisstovan er eitt arbeiðspláss við góðum trivnaði og góðum samstarvi millum fakbólkar. Vit bjóða tær eitt spennandi starv á einum stovni við sera fjølbroyttum uppgávum, har tú fært góðar møguleikar at menna tínar førleikar.

Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis í tøttum samstarvi við deildarleiðaran og hini starvsfólkini á deildini. Starvið fevnir bæði um innandura- og uttanduraarbeiði.

## Vit vænta

Vit vænta at umsøkjarin er ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevni og hevur hug at vera við at menna tað matrikulera arbeiðið í Føroyum.

Tú hevur góð samskiftisevni, bæði í skrift og talu, og dugir væl at samskifta við viðskiftafólk. Vit leggja dent á, at tú sær nýggjar og fjølbroyttar uppgávur sum avbjóðingar, og at tú røkkur teimum málum, sum tú setur tær.

Umsøkjarin skal hava prógv sum landmálingsteknikari ella hava aðra líknandi útbúgving. Koyrikort er ein treyt.

## Setanarviðurskifti

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Postboks 2048, 165 Argir
ella sum teldupostur til: us@us.fo.

Umsóknarfreistin er mánadagin
**20. mai 2019.**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ronnie Thomassen, deildarleiðara, á telefon 342400 ella við teldupostí til ronniet@us.fo

umhvørvisstovan

Postboks 2048, 165 Argir, tel 342400 · us@us.fo · www.us.fo